# KOMMUNUSTÝRISSKIPAN

## TVØROYRAR KOMMUNA

*Kristin Michelsen, borgarstjóri*

Lógargrundarlag

*Løgtingslóg um kommunustýri, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 57 frá 30. apríl 2018 (kommunustýrislógin)*

-dagførd 31. mars 2025

tvoroyri@tvoroyri.fo
J.nr. 24/00375
Fróði Mortensen, kommunustjóri

# Indhold


1. partur ....3
Býráðið ....3
2. partur ....4
Borgarstjórin ....4
3. partur ....5
Val av nevndum og vanligar reglur fyri virki teirra o.a. ....5
4. partur ....6
Fíggjarnevndin ....6
5. partur ....8
Føstu nevndirnar ....8
§25 ....9
Sosiala nevnd ....9
§26 ....9
Tekniskanevnd ....9
Mentanarnevndin ....10
§28 ....11
Vinnu- og havnanevndin ....11
§ 29 ....12
Trivnaðar- & umhvørvisnevndin ....12
6. partur ....13
Aðrar nevndir ....13
Skattakærunevndin fyri Suðuroy *(Avtikin)* ....13
Barnaverndarnevndin (Umboð í nevndina fyri Suðuroyar Barnaverndartænastu) ....13
Tilbúgvingarnevndin ....14
Ferðslunevndin ....14
Skúlastýri fyri Tvøroyrar skúla ....14
Kommunufelagið ....14
Valnevndin ....14
Musikkskúlin fyri Suðuroy ....14
Fyrireikingarbólkur til Suðuroyartunnilin ....15
Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn ....15
Umboð í IRF ....15
Umboð í SEV ....15
Suðuroyar Ellis- og Røktarheim ....15
Suðuroyar Bú- og Heimatænasta ....15
Barnaverndartænastan (Umboð í stýrið fyri samstarvsnevndin) ....15
FSR (Bygging av nýggjum kapppróðrarneystið á Hvítanesi) ....15
Suðuroyartunnlin, fyrireikingar- & fylgibólkur ....15
7. partur ....16
Samsýningar o.a. ....16
8. partur ....17
Broytingar í kommunustýrisskipanini o.a. ....17
Viðgerð og góðkenning ....17

# 1. partur

## Býráðið

§ 1

Tvøroyrar býráð hevur 7 limir, ið verða valdir eftir teimum til eina og hvørja tíð galdandi reglunum í kommunalu vallógini.

§ 2

**1. petti.** Samsvarandi reglunum í kommunustýrislógini, velur býráðið við meirilutavali ein borgarstjóra fyri alt valskeið býráðsins. Borgarstjórastarvið er fulltíðarstarv. Eisini velur býráðið við meirilutavali ein varaborgarstjóra, ið verður løntur við 10% av samsýning hjá borgarstjóra.

**2. petti.** Um borgarstjórin av eini ella aðrari orsøk hevur forfall, røkir varaborgarstjórin borgarstjórastarvið. Varir frávera hjá borgarstjóra ella varaborgarstjóra meira enn 2 mánaðir, skal býráðið velja fyribils borgarstjóra ella varaborgarstjóra í teirra stað við gildi til fráveran heldur uppat.

§ 3

Býráðið samtykkir eina fundarskipan, ið m.a. ásetur nærri reglur um fyrireiking, fundarboð, hvussu fundir skulu haldast og málsmannagongd o.a.

§ 4

**1. petti.** Býráðið tekur avgerð um, nær og hvar vanligir býráðsfundir skulu vera. Við byrjanini av hvørjum álmanakkaári verður hetta kunngjørt á tann hátt, ið vanliga verður nýttur í kommununi. Býráðið hevur almennan fund vanliga eina ferð um mánaðin.

**2. petti.** Eykafundir verða hildnir, tá ið borgarstjórin heldur tað vera neyðugt, ella um 1/3 av limunum krevur tað. Borgarstjórin ger av, nær og hvar eykafundirnir skulu vera, og um høvi er til tess, verða hesir almannakunngjørdir.

**3. petti.** Býráðs- ella nevndarlimur, ið hevur tørv at fáa upplýsingar frá kommunalu fyrisitingini í sambandi við málsviðgerð, fær hesa við at venda sær til býráðsskrivaran.

# 2. partur

# Borgarstjórin

§ 5

**1. petti.** Nærri reglur um virksemi borgarstjórans verða ásettar í kommunustýrisskipanini, sambært § 22 í kommunustýrislógini.

§ 6

**1. petti.** Borgarstjórin hevur dagligu leiðsluna av kommunalu fyrisitingini. Hetta samb. kapittul 4 í kommunustýrislógini, og eru uppgávur hansara m.a. hesar:

- hevur dagliga leiðslu av kommunalu fyrisitingini,
- býtir málini út til tær ymisku nevndirnar,
- tekur sær av málum, sum ikki fara í nakra nevnd,
- gevur fundarboð,
- fyrireikar býráðsfundir,
- kunnar býráðslimir um, hvørji mál koma fyri á fundum,
- leggur mál og málsupplýsingar fram við einum hóskandi tíðarskeiði, so at býráðslimir kunnu gera sær sína egnu meting um málið,
- boðar frá, hvørji mál eru beind í nevnd síðani síðsta fund,
- ansar eftir, at mál, ið krevja býráðsviðgerð, fáa tilíka viðgerð, og at neyðug ummæli verða fingin,
- sær til, at málini verða avgreidd og um neyðugt gera fyriskipan um hetta,
- tekur avgerðir í málum, ið ikki tola at bíða og har eingin orsøk er til iva,
- ansar eftir, at farið verður fram eftir samtyktum býráðsins,
- ansar eftir, at allar útreiðslur og inntøkur hava neyðuga játtan og
- saman við einum persóni, sum býráðið hevur heimilað til tess, undirskrivar øll skjøl, ið binda kommununa, tað verið seg keyps- og søluskjøl, leigusáttmálar, lániskjøl v.m.

**2. petti.** Borgarstjórin hevur eftirlit við, at mál, ið krevur býráðsins avgerð og hoyrir undir fyrisitingarøki hjá nevnd, verður lagt fyri býráðið saman við neyðugum nevndarummæli, áðrenn býráðið tekur avgerð.

**3. petti.** Borgarstjórin hevur eyguni eftir, at einki mál liggur á láni. Nevndirnar hava skyldu til at greiða honum frá teimum málum, tær hava við at gera, og hvussu tað liggur fyri við at avgreiða tey. Um tað er neyðugt, ger hann fyriskipan fyri, hvussu málini skulu verða avgreidd.

**§ 7**

**1. petti.** Borgarstjórin ansar eftir, at hvør peningaupphædd - tað veri seg inntøka ella útreiðsla við kommunukassan - er bókað í kommunuroknskapinum, og at upphæddin hevur heimild í ársfíggjarætlanini ella eykajáttan. Er talan um eina peningaupphædd, ið heimild ikki er fyri, leggur hann málið fyri býráðið.

## 3. partur

## Val av nevndum og vanligar reglur fyri virki teirra o.a.

**§ 8**

**1. petti.** Til at taka sær av teirri beinleiðis fyrisitingini av viðurskiftum kommununnar verða skipaða ein fíggjarnevnd og ein ella fleiri aðrar fastar nevndir. Nevndirnar skipa seg sjálvar.

**2. petti.** Býráðið velur limir í tær nevndir, stjórnir og tílíkt, har býráðið ella kommunan sambært øðrum fyriskipanum skal verða umboðað.

**3. petti.** Val av limum og tiltakslimum í fastar nevndir o.a. fer fram á fyrsta býráðsfundi og beint aftan á valið av borgarstjóra og varaborgarstjóra. Valið fer fram eftir lutfalsvalháttinum sbrt. § 3. Verður avgjørt at velja av nýggjum, stendur øll nevndin fyri vali.

**§ 9**

**1. petti.** Býráðið kann seta serstakar ráðgevandi nevndir og staðbundnar nevndir, ið skulu taka sær av ávísum málum ella gera fyrireikandi ella ráðgevandi arbeiði fyri býráðið, fíggjarnevndina ella hinar føstu nevndirnar.

**§ 10**

**1. petti.** Hvør nevnd hevur sína gerðabók, har allar samtyktir nevndarinnar verða førdar. Við fundarlok verður gerðabókin lisin upp og undirskrivað av øllum teimum luttakandi nevndarlimunum.

**2. petti.** Hevur nevndarlimur serstøðu, kann hann krevja, at serstøða hansara í stuttum verður viðmerkt í gerðabókini. Tá mál, har nevndarlimur hevur serstøðu sambært gerðabókini, verða send øðrum myndugleikum, kann nevndarlimur krevja, at myndugleikin verður kunnaður um tað, ið stendur í gerðabókini. Nevndarlimurin kann viðleggja málinum grundgeving fyri serstøðu síni.

**§ 11**

**1. petti.** Hendir tað, at ein nevnd hugsar um at fremja ætlanir, ið nerta við arbeiðsøkið hjá aðrari nevnd, verða samráðingar at fara fram við hesa ella ummæli fingið frá hesi nevnd, áðrenn ætlanirnar verða settar í verk. Um neyðugt luttaka fíggjarnevndin og borgarstjórin í samráðingunum.

**§ 12**

**1. petti.** Nevndarformaðurin ansar eftir, at ikki verður brúktur meira peningur enn avsettur er sambært teim einstøku upphæddunum á árs fíggjarætlanini ella er játtaður við eykajáttan. Um tað er hildið ynskjandi ella neyðugt at játta meira pening, senda nevndirnar - um fíggjarnevndina - býráðnum tilráðing hesum viðvíkjandi.

**§ 13**

**1. petti.** Nærri reglur um nevndararbeiði kunnu verða ásettar í fundarskipan, sum býráðið góðtekur.

# 4. partur

## Fíggjarnevndin

**§ 14**

**1. petti.** Í fíggjarnevndini situr borgarstjórin, ið er nevndarformaður, og 2 aðrir býráðslimir. Fíggjarnevndin fyrisitur tey málsøki, sambært kapittul 8 í kommunustýrislógini.

**2. petti.** Fíggjarnevndin fyrisitur mál viðvíkjandi kassa- og roknskaparverkinum, lønar- og starvfólkaviðurskiftum, sølu av ognum hjá kommununi, leigusáttmálar av ognum í minni enn fimm ár og allari umsiting kommununnar.

**§ 15**

**1. petti.** Fíggjarnevndin ansar eftir, at peningaognir kommununnar - íroknaður tann peningur, ið ikki er neyðugur til gjaldingar av dagligu útreiðslunum - verða goymdar á tryggan hátt og eisini soleiðis, at tær geva sum mest av sær.

**2. petti.** Tær peningaognir, ið ikki eru neyðugar at hava til taks í reiðum peningi fyri at greiða dagligu útreiðslurnar, skulu verða settar inn í peningastovn, á postgirokonto ella settar í slík lánsbrøv, sum verða nýtt, tá ið tað snýr seg um ognir hjá ómyndingum.

**3. petti.** Virðisbrøv kommununnar skulu - um tey ikki verða tryggjað á annan fullgóðan hátt - fáa átekning um, at tey eru ogn kommununnar, og at eingin hevur ræði á nøkrum virðisbrævi uttan við samtykki býráðsins. Um tað er møguligt, skal átekningin verða skrivað í bók hjá avvarðandi stovni.

**4. petti.** Somu skyldur, sum frammanfyri eru tilskilaðar, hevur fíggjarnevndin viðvíkjandi øðrum peningaognum, sum kommunan hevur um hendur.

**§ 16**

**1. petti.** Fíggjarnevndin sendir býráðnum uppskot til ársfíggjarætlan fyri komandi fíggjarár.

**2. petti.** Uppskot til ársfíggjarætlan skal viðgerast tvær ferðir í býráðnum við í minsta lagi 14 daga millumbili. Ársfíggjarætlanin skal vera endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember og latin landsstýrismanninum innan 3 gerandisdagar aftaná.

**3. petti.** Við hvørjari upphædd á uppskotinum skal verða viðmerkt:
1. tann upphædd, ið verður skotin upp fyri komandi ár.
2. tann upphædd, ið er avsett fyri verandi roknskaparár, og
3. tann upphædd, ið er inngoldin ella brúkt 1. hálvár í inniverandi ári.

§ 17

**1. petti.** Fíggjarnevndin hevur ábyrgdina av at:

- gjørd verður ein bókhaldsførsluskipan, ið gjølla sýnir, hvussu kommunuognin verður umsitin,
- liðugur roknskapur við møguligum viðmerkingum verður grannskoðaður,
- viðgera og taka støðu til viðmerkingar frá grannskoðanini,
- leggja grannskoðaðan roknskap fyri býráðið til góðkenningar og undirskrivingar, og
- leggja grannskoðanarfrágreiðing fyri býráðið til viðgerðar.

§ 18

**1. petti.** Fíggjarnevndin ansar eftir, at ikki verður farið upp um tær á fíggjarætlanini viðtiknu peninga-upphæddir ella samtyktu eykajáttanir, hvørki tilsamans ella tá talan er um einstakar upphæddir, og at ikki verður farið undir eitt arbeiði, fyrr enn neyðug játtan er tøk sbrt. § 19, 2. petti.

§ 19

**1. petti.** Fíggjarnevndin hevur eftirlit við fyrisitingini av peningi og bókhaldi kommununnar. Hon ansar eftir, at inntøkurnar hjá kommununi koma inn rættstundis, og at møgulig útistandandi skuld verður innkravd. Eisini ansar nevndin eftir, at eftirstøðulistar verða gjørdir og kannar hesar við hóskandi millumbili.

**2. petti.** Fíggjarnevndin ásetur tær reglur, sum kommunala umsitingin hevur at ganga eftir, tá ið tað snýr seg um at siga nevndini frá, um tað í nøkrum føri er farið - ella kann væntast at verða farið - upp um tær einstøku peningaupphæddir á ársfíggjarætlanini ella tær upphæddir, ið játtaðar eru sambært eykajáttan.

**3. petti.** Fíggjarnevndin ansar eftir, at øll skjøl verða goymd á tryggan hátt. Fíggjarnevndin skal tryggja, at KT skipanir hjá kommununi lúka ásettu krøv í dátuverndarlógini.

## 5. partur

## Føstu nevndirnar

**§ 20**

**1. petti.** Hesar føstu nevndir skulu verða valdar:

- Sosiala nevnd
- Tekniska nevnd
- Mentanarnevnd
- Vinnu- og havnanevnd
- Trivnaðar- og umhvørvisnevnd

**§21**

**1. petti.** Allir býráðslimir skulu hava fundarskrá til fundirnar í føstu nevndunum.

**2. petti.** Limirnir í teim í 1. petti umrøddu nevndum verða valdir millum býráðslimirnar eftir lutfallsvalið.

**§ 22**

**1. petti.** Eftir áheitan frá fíggjarnevndini og innan eina tíðarfreist, sum henda nevnd setur, skulu nevndirnar koma við teirra parti av uppskotinum til ársfíggjarætlanina og til gerð av íleggingar- og rakstrarætlanum.

**§ 23**

**1. petti.** Hvør nevnd gevur tilmæli til býráðið í málum, innan hennara fyrisitingarøki, har tað sambært lóg áleggur býráðnum at geva tilmæli ella taka støðu.

**§ 24**

**1. petti.** Hvør nevndarformaður ansar eftir, at ikki verður farið upp um tær á fíggjarætlanini viðtiknu peningaupphæddir og eykajáttanir, hvørki tilsamans ella tá talan er um einstakar upphæddir, og at ikki verður farið undir eitt arbeiði, fyrr enn neyðug játtan er tøk sbrt. § 19, 2. petti.

## §25

## Sosiala nevnd

**1. petti.** Sosiala nevnd hevur 3 limir.

**2. petti.** Nevndin tekur avgerðir í málum, ið sambært lóggávuni hoyra undir Sosialu nevndina.

**3. petti.** Nevndin fyrisitur teir stovnar hjá kommununi, ið ætlaðir eru til barnaansingarøkið, sosial- og heilsulig endamál.

**4. petti.** Nevndin fyrisitur mál viðv. Suðuroyar Barnaverndartænastu og Bú- og Heimatænastuni BHS, Eldratiltøk, familjumál og almannamál.

## §26

## Tekniskanevnd

**1. petti.** Tekniska nevndin hevur 3 limir.

**2. petti.** Nevndin fyrisitur kommunalu teknisku málsøkini, sum t.d. vatnverkini, vegirnar, kloakkirnar, gøtuljósini, kirkjugarðar og onnur teknisk viðurskifti, ið ikki hoyra undir aðra nevnd, og skipar fyri teimum arbeiðum, sum skulu verða gjørd í hesum sambandi. Nevndin ansar eftir, at tær viðtøkur og reglugerðir, sum galda fyri nevndu málsøki, verða fylgdar.

**3. petti.** Nevndin hevur tekniskt eftirlit við almennum plássum, vegum, kloakkum, reinsiverkum, almennum nátthúsum o.ø.

**4. petti.** Tá gøtu-, veg- og onnur íleggingararbeiði skulu verða sett í verk, sendir nevndin tilmæli til býráðið hesum viðvíkjandi, jfr. § 11, 2. petti, og skipar fyri, at arbeiðini verða framd samsvarandi teirri av býráðnum samtyktu arbeiðsætlan.

**5. petti.** Nevndin fyriskipar uppsetan av navnaskeltum á gøtum, vegum, torgum, støðum o.ø. og hevur í øllum førum eftirlit við, at fyriskipanirnar í vegareglugerðini um gerð og yvirtøkur av gøtum og vegum verða hildnar.

**6. petti.** Nevndin fyrisitur viðalundir, gøtur og fríðkan annars í kommununi.

**7. petti.** Skylda kommununnar til at reinsa gøtur, vegir og pláss (torg) er løgd til nevndina, og leiðir og útinnir hon hesi arbeiði - eisini tá talan er um kavagrevstur og at beina fyri burturkastinum frá øllum hesum arbeiðum.

**8. petti.** Nevndin fyrisitur øll mál, ið sambært byggilóggávu og lóg um býarskipanir og byggisamtyktir eru løgd undir býráðið.

**9. petti.** Nevndin fyrisitur allar umsóknir um bygging og sundurluting og viðger hesar sambært galdandi lógum, reglugerðum og fyriskipanum og ansar eftir, at øll bygging er í samsvari við hesum.

**10. petti.** Nevndin sendir býráðnum um fíggjarnevndina tilráðing um keyp ella sølu av føstum ognum og um burturleigu av teimum ognum, sum nevndin útinnir viðlíkhaldið av. Eisini sendir hon eftir áheitan fíggjarnevndini tilmæli viðvíkjandi burturleigu av ognum.

**§ 27**

## Mentanarnevndin

**1. petti.** Mentanarnevndin hevur 3 limir.

**2. petti.** Nevndin fyrisitur fíggjarviðurskiftini hjá kommunalum skúlum, ítróttarhøll, svimjihøll og umsitur útvegan av innbúgvi, amboðum og tílíkum til teirra. Nevndin fyrisitur, í samráð við teknisku deild, viðlíkahaldinum av skúlabygningum.

**3. petti.** Nevndin gevur viðmæli til býráðið í málum viðvíkjandi nøvnum á nýggjum gøtum, vegum o.ø. sambært tilmæli frá serstakari nevnd, bólki e.ø.

**4. petti.** Nevndin fyrisitur mál, ið snúgva seg um útlán og burturleigu av rúmum í kommunalum ognum til nýstlu hjá feløgum o.ø., ið ætlað eru til mentanarendamál o.a., vísandi til § 27, petti 2.

**5. petti.** Eftir gjøllari reglum frá býráðnum umsitur nevndin stuðulsjáttanir til skúlabørn og til feløg, herundir eisini fyri stovnandi tiltøkum til frama fyri slík, o.tl.

**6 petti.** Eisini fyrisitur nevndin bókasavnsviðurskifti kommununnar, søvn, søguligir bygningar og onnur mál av mentunarligum týdningi í kommununi, herundir mentanarnátt, jóansøku og jólahald o.tíl. mentanarlig tiltøk.

**7. petti.** Vegna Tvøroyrar Býráð varðar nevndin av samstarvinum við mentanarhúsið Salt og Saltsilogrunnin.

**8. petti.** Eftir gjøllari reglum frá býráðnum umsitur nevndin stuðulsjáttanir til skúlabørn og til feløg, herundir eisini fyri stovnandi tiltøkum til frama fyri slík, o.tl.

§28

## Vinnu- og havnanevndin

**1. petti.** Vinnu- og havnanevndin hevur 3 limir.

**2. petti.** Nevndin fyrisitur mál, ið snúgva seg um vinnu- og havnaviðurskifti í kommununi.

**4. petti.** Nevndin varðar av og umsitur niðanfyri økir

- Tvøroyrar Havn
- Smábátahavnina
- Bátahyljar
- Vinnubygningar og vinnuøki
- Fiskivinnu
- Oljuvinnu
- Ferðavinnu herímillum cruisevinnu
- Visit Suðuroy á Tvøroyri
- Handils- og tænastuvinnu
- Vinnunýskapan og –íverksetan
- Vinnustrategi

**3. petti.** Nevndin fyrisitur eisini kommunalar bygningar og annan útbúnað og ognir, ið hoyra havnunum til.

## § 29

## Trivnaðar- & umhvørvisnevndin

**1. petti.** Trivnaðar- og umhvørvisnevndin hevur 3 limir.

**2. petti.** Nevndin tekur avgerð í málum, ið sambært lóggávu eru løgd til býráðið, og sum í breiðum høpi snúgva seg um trivnaðar- og umhvørvisøki í kommununi, og sum ikki innganga í aðrar nevndir.

**3. petti.** Nevndin fyrisitur mál viðvíkjandi integratión.

**4. petti.** Nevndin varðar av og umsitur niðanfyri økir :

- Tilhaldið Snaran
- Ungdómspolitikk
- Tiltøk og tilboð til ung
- Ungdómshús
- Náttúru- og umhvørvispolitikk
- Orkumál herímillum varandi orku
- Umhvørvismál
- Umhvørvisátøk
- Trivnaðarmál
- Trivnaðarátøk
- Job Match

**4. petti.** Nevndin fyrisitur viðalundir, gøtur, spælipláss og fríðkan annars í kommununi.

# 6. partur

# Aðrar nevndir

**§ 30**

## Skattakærunevndin fyri Suðuroy *(Avtikin)*

~~*Er avtikin við kunngerð nr. 101 frá 13. juni 2022 um at seta úr gildi kunngerð um val av limum í kommunalu skattakærunevndirnar*~~*. Samtykt á býráðsfundi 31.03.2025, at nevndin verður strika.*

**§ 31**

## Barnaverndarnevndin (Umboð í nevndina fyri Suðuroyar Barnaverndartænastu)

Løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 139 frá 18. desember 2013 - *Formaðurin og meirilutin í nevndini skulu í minsta lagi hava eina viðkomandi miðallanga útbúgving. Harumframt skulu limirnir lúka treytirnar til val til bý- ella bygdarráð og hava reina revsiváttan. - Barnaverndarnevndin velur sjálv formann og næstformann-.*

**1. petti.** Suðuroyar Barnaverndartænasta byggir á eina samstarvsavtalu millum allar kommunur í Suðuroynni frá 1. januar 2014 sum hevur sítt útgangsstøði í nevndu lóg.

**2. petti.** Nevndin fyrisitur mál, ið sambært barnaverndarlógini, kunngerðum, reglum um barnavernd og fyriskipanum, eru løgd undir kommununa, og skipar fyri teimum arbeiðum, sum skulu verða gjørd í hesum sambandi.

**3. petti.** Hvør kommuna í samstarvinum velur eitt umboð og eitt varaumboð.

§ 32

## Tilbúgvingarnevndin

**1. petti.** Tilbúgvingarnevndin er samstarvsnevnd millum Tvøroyrar- ,Hvalbiar og Fámjin Kommuna, har kommunurnar í samstarvinum halda rakstrarútreiðslurnar í mun til fólkatalið.

**2. petti.** Tilbúgvingarnevndin fyrisitur alla tilbúgvingina í Suðuroyar norðara helvt, sambært tilbúgvingarlógini, kunngerðum og reglum um tilbúgving, ið eru løgd undir kommununa at umsita.

**3. petti.** Tilbúgvingarnevndin skipar fyri teimum arbeiðum, sum skulu verða gjørd í hesum sambandi.

**4. petti.** Allir borgarstjórar í samstarvinum eru 1. valdir limir í tilbúgvingarnevndina.

**5. petti.** Kommunurnar í samstarvinum velja umframt borgarstjóran, 1 varalim, við undantak av Tvøroyrar kommuna sum velur, -umframt borgarstjóran- 2 fastar limir og 3 varalimir.

**6. petti.** Aðrir limir í tilbúgvingarnevndini eru:

- Tilbúgvingarleiðarin í Suðuroyar norðara helvt, umframt 1. varalimur
- Formaðurin í Suðuroyar Norðara Bjargingarfelag, umframt 1. varalimur
- Sýslumaðurin, umframt 1. varalimur frá løgregluni

**7. petti**. Tilbúgvingarnevndin telur íalt 8 limir, har borgarstjórin í Tvøroyrar kommunu er føddur formaður.

§ 33

## Ferðslunevndin

Somu limir sum í teknisku nevnd umframt umboð fyri politiið við varalimi og umboð fyri koyrilærararnar við varalimi.

§ 34

## Skúlastýri fyri Tvøroyrar skúla

- Tvøroyrar býráð velur 2 limir og 2 varalimir

## Kommunufelagið

- Borgarstjorin er fastur limur í stýrinum fyri kommunufelagið

## Valnevndin

- Tvøroyrar býráð velur 5 limir og 5 varalimir.

## Musikkskúlin fyri Suðuroy

- Tvøroyrar býráð velur 1 lim og 1 varalim.

## Fyrireikingarbólkur til Suðuroyartunnilin

- Tvøroyrar býráð velur 2 lim og 2 varalim.

## Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn

- Tvøroyrar býráð velur 1 lim og 1 varalim

## Umboð í IRF

- Tvøroyrar býráð velur 1 umboð og 1 varaumboð, ið hevur atkvøðurætt. Allir býráðslimir kunnu tó møta á nevndar- og aðalfundi.

## Umboð í SEV

- Tvøroyrar býráð velur 1 umboð og 1 varaumboð, ið hevur atkvøðurætt. Allir býráðslimir kunnu tó møta á nevndar- og aðalfundi.

## Suðuroyar Ellis- og Røktarheim

- Tvøroyrar býráð velur 1 lim og 1 varalim.

## Suðuroyar Bú- og Heimatænasta

- Eftir ásetinging í §7, stk. 1 í LL 20. um kommunalt samstarv um heimatænastu, eldrarøkt v.m., fær hvør kommuna 1 lim og 1 varalim. Borgarstjórin er fyrstvaldi limurin. Í kommunum við fleiri enn 1 limi verða valdir 2 varalimir, fyrsti og annar varalimir.

## Barnaverndartænastan (Umboð í stýrið fyri samstarvsnevndin)

Løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 139 frá 18. desember 2013

Tvøroyrar býráð velur ein lim og ein varalim.

**1. petti.** Suðuroyar Barnaverndartænasta byggir á eina samstarvsavtalu millum allar kommunur í Suðuroynni frá 1. januar 2014 sum hevur sítt útgangsstøði í nevndu lóg.

**2. petti.** Samstarvsnevndin skipar umsitingina av Barnaverndartænastuni, har kommunurnar í samstarvinum halda rakstrarútreiðslurnar í mun til fólkatalið.

**3. petti**. Samstarvsnevndin verður sett umboðandi kommunurnar í samstarvinum. Hvør kommuna velur eitt umboð og eitt varaumboð í samstarvsnevndina. Í kommunum, sum hava sosiala nevnd, er borgarstjórin varaumboð. Um borgarstjóri er valdur limur, so velur kommunan annað varaumboð.

## FSR (Bygging av nýggjum kappróðrarneystið á Hvítanesi)

- Tvøroyrar býráð velur 4 limur og 1 tiltakslimur, umframt ráðgeva
    - *(Form. í FSR er form í bygginevndini)*

## Suðuroyartunnlin, fyrireikingar- & fylgibólkur

- Tvøroyrar býráð velur tveir limir og tveir varalimir.

# 7. partur

# Samsýningar o.a.

**§ 35**

**1. petti.** Samsýning til borgarstjóran smb. kunngerð nr. 93 frá 9. september 2014 um samsýning o.a. sambært kommunustýrislógini

Borgarstjórin fær samsýning eftir §10, stk. 2 í omanfyri nevndu kunngerð og er setanarbrøkurin 1/1.

**2. petti.** Samsýning til varaborgarstjóran smb. kunngerð nr. 93 frá 9. september 2014 um samsýning o.a. sambært kommunustýrislógini:

Varaborgarstjórin fær fasta samsýning eftir §11, stk. 2 í omanfyri nevndu kunngerð, sum er 10% av samsýningini, ið verður givin borgarstjóranum sambært § 10.

**3. petti.** Samsýning til kommunustýrislimir smb. kunngerð nr. 93 frá 9. september 2014 um samsýning o.a. sambært kommunustýrislógini:

Tvøroyrar býráð hevur avgjørt, at býráðslimir, nevndarformenn og nevndarlimir fáa fasta mánaðarliga samsýning eftir §1, nr. 2 í omanfyri nevndu kunngerð.

Fasta samsýningin umfatar alt vanligt nevndararbeiði, t.v.s. luttøka á fundum, fyrireiking o.a. arbeiði knýtt at nevndararbeiðnum, t.d. ástaðarfundir og kunnandi fundir hjá øðrum myndugleikum o.l. Eisini umfatar fasta samsýningin arbeiðið í nevndum í felagsskapum o.l., har kommunan hevur fastan lim. Tó kunnu hesir felagsskapir velja at veita nevndarlimum samsýning fyri arbeiðið. Samsýning verður tó veitt býráðslimi fyri fundir í skúlastýrinum.

Smb. § 4 í omanfyri nevndu kunngerð, ber til at veita eyka samsýning í ávísum førum, tá tað snýr seg um uppgávur, ið greitt fara útum tað vanliga arbeiði knýtt at starvinum sum kommunustýrislimur, nevndarformaður ella –limur. Hendan ásetingin kann vera brúkt, um kommunustýrislimur verður sendur á fund norðanfjørðs ( t.d. Kommunufelagið, IRF, SEV), treytað av, at annar myndugleiki ikki veitir samsýning. Ásetingin kann eisini verða nýtt, um kommunustýrislimur luttekur á skeiði, sum býráðið hevur góðkent.

Ístaðin fyri eyka samsýning kann endurgjald verða latið fyri skjalprógvaða mista inntøku orsakað av fundum og virksemi. Endurgjaldið kann tó ikki vera hægri enn kr. 1.800,- fyri hvønn dagin.

## 8. partur

## Broytingar í kommunustýrisskipanini o.a.

**§ 36**

Hendan kommunustýrisskipan og broytingar í henni skulu verða viðgjørd á tveimum býráðsfundum, við minst 14 daga millumbili.

**§ 37**

### Viðgerð og góðkenning

Fyrsta viðgerð og samtykt á býráðsfundi hin 30.01.2025

| | |
|---|---|
| Kristin Michelsen<br>Borgarstjóri | Fróði Mortensen<br>Kommunustjóri |

Onnur viðgerð og endaliga samtykt á býráðsfundi hin 31.03.2025

| | |
|---|---|
| Kristin Michelsen<br>Borgarstjóri | Fróði Mortensen<br>Kommunustjóri |